# Katrin Olsen vann World Cup-stevnu

Um vikuskiftið tók rógvarin, Katrin Olsen, lut í stóru World Cup-stevnuni í Linz í Eysturríki. Her skuldi hon, saman við Juliane Elander, vera við í kappingini hjá lættvektsdupultscollarinum hjá kvinnum. Útlitini vóru tó helst ikki tey bestu hjá danska bátinum, tí við í kappingini vóru m.a. heimsmeistararnir úr Kina og HM-bronsuvinnararnir úr Grikkalandi. Danski báturin fekk eina heldur vánaliga byrjan uppá finaluumfarið, og eftir 1000 metrum lógu tær á einum fimta plássi. Eftir hetta vendi gongdin tó hjá Katrin og Juliane. Løtu seinni høvdu tær vunni ðseg uppá fyrsta plássi, og hetta plássið hildu tær allan vegin á mál. Sostatt gjørdust Katrin og Juliane vinnarar av fyrstu World Cup-stevnuni í ár.



# Di Luca vann Giro d' Italia

Sunnudagin var síðsta etapan á skránni í stóru italsku súkklukappingini, Giro d'Italia, sum verður mett at vera millum tríggjar tær størstu kappingarnar innan súkkluheimin. Italiumaðurin, Danilo di Luca, sum súkklar fyri Liquigas, legði seg á odda tíðliga í kappingini, og hóast fleiri av mótstøðumonnunum royndu at trýsta hann, so megnaði di Luca at varðveita ljósareyðu troyggjuna allan vegin á mál. Bert 21 ára gamli luksemburgarin, Andy Schleck, sum súkklar fyri danska felagið Team CSC, endaði á øðrum plássi, meðan Eddy Mazzoleni frá Astana endaði nummar trý. Seinasta etapan bleiv vunnin av italska sprintaranum, Alessandro Petacchi.

**Fimmmannafør dreingir (1000 m):**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1. | Sílið | 5.37.23 |
| 2. | Havfrúgvin | 5.38.09 |
| 3. | Teistin | 5.46.05 |
| 4. | Jómfrúgvin | 5.56.08 |
| 5. | Tjaldrið | 5.57.23 |
| 6. | Jallurin | 6.00.20 |
| 7. | Blikur | 6.04.24 |

**Fimmmannafør gentur (1000 m):**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1. | Hvassi | 6.20.21 |
| 2. | Tambar | 6.28.00 |
| 3. | Drekin | 6.40.10 |
| 4. | Ørnin | 7.37.10 |
| 5. | Blikur | 7.42.24 |
| 6. | Teistin | 7.43.20 |

**Fimmmannafør kvinnur (1000 m):**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1. | Sílið | 6.05.16 |
| 2. | Teistin | 6.06.24 |
| 3. | Fípan Fagra | 6.09.17 |
| 4. | Frúgvin | 6.12.07 |
| 5. | Ørnin | 6.14.17 |
| 6. | Ritan | 6.22.10 |
| 7. | Jallurin | 6.26.00 |
| 8. | Erla Kongsdóttir | 7.00.18 |
| 9. | Blikur | 7.10.06 |

**Seksmannafør kvinnur (1000 m):**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1. | Jarnbardur | 6.21.08 |
| 2. | Kollfirðingur | 6.52.12 |

**Seksmannafør menn (1500 m):**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1. | Sundabáturin | 8.17.15 |
| 2. | Strálan | 8.21.12 |
| 3. | Tvøråbáturin | 8.21.13 |
| 4. | Jarnbardur | 8.29.10 |
| 5. | Riddarin | 8.36.01 |
| 6. | Lómur | 8.43.12 |
| 7. | Smyril | 8.49.23 |
| 8. | Rodni | 9.05.02 |

**Áttamannaførini (1500 m):**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1. | Heiðabáturin | 7.42.03 |
| 2. | Argjabáturin | 7.56.22 |
| 3. | Ørvur | 7.57.24 |
| 4. | Knørrur | 8.08.23 |
| 5. | Árnfirðingur | 8.11.02 |

**Tíggjumannaførini (1500 m):**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1. | Eysturoyingur | 7.47.17 |
| 2. | Vestmenningur | 8.07.01 |



*8-mannafarið, Heiðabáturin, gjørdi tað bragdið á Norðoyastevnu, at teir komu á mál í eini betri tíð enn 10-mannafarið, Eysturoyingur.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Heiðabáturin í stórum stíli

**8-mannafarið hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ, Heiðabáturin, vann fyrsta róðurin hjá 8-mannaførunum í ár. Tað, sum tó var meir merkisvert, var, at Heiðabáturin kom á mál í eini betri tíð enn flaggskipið hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ, Eysturoyingur**

KAPPRÓÐUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Leygardagin blivu fyrstu tøkini tikin í føroyska kappróðrarárinum, tá Norðoyarstevnuróðurin var á skránni. Bert 43 bátar høvdu boðað frá luttøku á fyrstu stevnuni, men tá alt kom til stykkis, vóru tað bert 39 bátar, sum róðu kapp á fyrstu stevnuni á árinum.

Hetta er eitt óvanliga lágt tal og hyggja vit at luttøkuni í fjør, so høvdu fleiri enn 70 manningar boða frá luttøku til Norðoyastevnuróðurin 2006. Tað vil siga, at áhugin av eini ella aðrari orsøk er nógv minkaður í ár.

Tað merkti eisini stevnuni, at tveir av róðrunum bert høvdu luttøku av tveimum manningum. Bæði hjá 6-mannaførum kvinnum og hjá 10-mannaførunum vóru bert tveir bátar við í kappingini, og serliga 10-mannafarsróðurin var eitt stórt vónbrot. Oftast eru fólk serliga spent til at fylgja hesi kappingini, men í ár var at kalla einki fólk eftir á havnarlagnum í Klaksvík, tá 10-mannafarsróðurin bleiv skotin í gongd.

Alt hetta fara tit tó at hoyra um í blaðnum í morgin. Her fara vit at hyggja nærri at eini rættiliga serligari hending, sum fór fram á Norðoyarstevnuróðrinum leygardagin.

**Heiðabáturin vann á flaggskipinum**

Kappróðrarveðrið á Norðoyastevnu var heilt hampiligt henda leygardagin. Tað var heldur kalt hjá áskoðarunum, sum stóðu við havnarlagið í Klaksvík, men hjá manningunum úti á fjørðinum mundi ikki bila. Tær høvdu vindin ímóti ávegis á leiðini móti málinum, men hetta tóktist tó ikki ávirka tað heilt stóra.

Fyrstu fýra róðrarnir gingu skjótt at avgreiða, áðrenn málið bleiv flutt út á 1500 metrar. Tá var ein lítil løtu at bíða, meðan málið bleiv flutt, men tá róðrarnir fóru í gongd aftur, gekk aftur sera skjótt.

Tá 6-mannaførini við monnum høvdu róð, var tíðin komin til 8-mannaførini. Her vóru fimm bátar við í kappingini, men kappingin bleiv ongantíð serliga spennandi. Heiðabáturin úr Kappróðrarfelagnum NSÍ setti alla mótstøðu til viks henda dagin, tá teir vunnu í tíðini 7.42.03. Hetta var næstan 15 sekund betri enn Argjabáturin, sum endaði á øðrum plássi.

Eftir hetta var tíðin so komin til 10-mannaførini, har bert tveir bátar vóru við. Her vann Eysturoyingur ein tryggan sigur, tá teir komu á mál í tíðini 7.47.17. Henda tíðin var heili fimm sekund verri enn tíðin hjá Heiðabátinum, og tí eydnaðist 8-mannafarinum hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ at koma á mál í eini betri tíð enn flaggskipið, Eysturoyingur, henda dagin.

Hetta er ikki komið ofta fyri í føroyskari rógving, og hetta má eisini metast at vera sera, sera flott av manningini á Heiðabátinum.

Manningin á Heiðabátinum vann í fjør føroyameistaraheitið umborð á 6-mannafarinum, Sølmundi. Í ár høvdu teir tó valt at royna eydnuna í 8-mannaførunum, og tí vistu teir slett ikki, hvat teir skuldu væntað, sigur ein av rógvarunum umborð.

- Vit eru nýggir í 8-mannaførum. Í fjør mannaðu vit 6-mannafarið, Sølmund, og tí vistu vit slett ikki, hvat vit skuldu vænta. Hetta gekk tó ótrúliga væl, og tað er fantastiskt at vinna á fyrstu stevnuni, sigur Hans Karl Jacobsen, sum rør við Heiðabátinum.